Gøtu Kommuna

## Gøtu kommuna søkir

1 Dagrøktara, at byrja skjótast tilber.

Dagrøktarheimið skal vera innrættað barnavinarligt, har rúm er til børnini at spæla í og hóskandi trygt spæliøki uttanfyri.

Í skipanini eru tvær dagrøktarar, ein í Syðrugøtu og ein í Norðragøtu. Vit hava skipað eina spælistovu, har dagrøktarar saman við børnunum og leiðaranum koma saman til ymiskt – ein dag um vikuna – mánadag frá kl. 7.30 til kl. 12.00. Vit eru í stovuni sum frítíðarskúlin brúkar.

Lønin er sambært sáttmála við Føroya Kommunala arbeiðsgevarafelag.

## Til Dagstovnin í Gøtu søkist

1 pedagog til starv í frítíðarskúlanum, at byrja 01.03.03.
Arbeiðstíðin er 30 tímar um vikuna.
Frítíðarskúlin er normeraður til 10 børn og 2 starvsfólk, 1 pedagog 30 tímar um vikuna og 1 hjálparfólk 20 tímar um vikuna.

1 pedagog til starv í barnagarðsstovu, at byrja 01.03.03.
Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna.
Í løtuni eru 14 børn á stovuni harav nøkur eru 1/2 tíð, hetta er tilsamans 11 heil pláss og 2 starvsfólk, 1 pedagogur 40 t. um vikuna og 1 hjálparfólk 25 t. um vikuna.

Í dagstovninum eru 5 stovur, ein vøggustova 14 pláss 0-2 ár, ein smábarnastova 18 pláss 2-4 ár, ein barnagarðsstova 21 pláss 4-6 ár, ein barnagarðsstova við børnum í forskúlaaldri 20 pláss og frítíðarskúlin til børn í 1. flokki 10 pláss. Dagstovnurin lat upp 1. februar 2000, og liggur í hugnaligum og barnavinarligum umhvørvi, við Gøtugjógv.

Um eingin pedagogur søkir verður hjálparfólk sett. Lønin er sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Torgerð Hansen, tlf. 442012 lokal 10.

Skrivlig umsókn, skal sendast okkum áðrenn fríggjadagin 24. januar 2003.

Bygdarráðið tekur sær rætt til frítt at velja ímillum umsóknirnar ella ongan at seta.

**Dagstovnurin í Gøtu,**
boks 32
511 Gøtugjógv



## Akfør við skaða til sølu

**Merki:** Suzuki Baleno GLX
**Árg.:** 1997
**Km:** 47.538
**Sak nr.:** 12198/1124

**Merki:** Citroen Xantia 2.0
**Árg.:** 1999
**Km:** 56.899
**Sak nr.:** 5858/5106

**Sýnsmaður:** Heri Weihe
tlf. 34 57 29 · fax nr. 34 56 07
hw@trygging.fo

**Merki:** Nissan Micra 1.0 L
**Árg.:** 1998
**Km:** 52.000
**Sak nr.:** 13898/12901

**Merki:** Toyota Yaris Luna 1.3 – 5 hurðar
**Árg.:** 2002
**Km:** 2.003
**Sak nr.:** 13377/12380

**Sýnsmaður:** Bjartur Brekkstein
tel. 34 57 71 – fax 34 56 07
bjb@trygging.fo

**Merki:** Citroen Saxo Diesel – 3 hurðar
**Árg.:** 1998
**Km:** 90.345
**Sak nr.:** 14899/13902

**Sýnsmaður:** Fróði Müller
tel. 34 57 27 – fax 34 56 07
fm@trygging.fo

**Merki:** Toyota Corolla st. car 2.0 D
**Árg.:** 1999
**Km:** 41.631
**Skaði:** Forendin hevur verið undir í sjógvi. Bilurin stendur á Bilverkstaðnum hja John Heinesen í Klaksvík.
**Sak nr.:** 11885/10958

**Sýnsmaður:** Ólavur Samson
tel. 345645 – fax 456527
os@trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Tel. 34 56 00 – fax 34 56 07
Sýnsmennirnir eru at hitta:
Mána- til hósdag kl. 8.30-10.00 og 15.00-16.00
og fríggjadag frá kl. 8.30-12.00 og 13.00-16.00



Havnar SJÚKRAKASSI

## Limagjaldið fyri 2003

Limagjaldið fyri A- og B-limir er kr. 200,- fyri mánaðin í 2003.

**Havnar Sjúkrakassi**



## Sethús í Havn til sølu

**Javnagøtu 10**



Húsini eru í 2 hæddum, hvør 120 fermetrar og standa í barnavinarligum, friðarligum umhvørvi við góðum útsýni.
Báðar hæddir eru innrættaðar, við íbúð í niðaru hædd. Grundøkið er uml. 500 fermetrar.
Uttanum húsini er stoyptur garður við trægirðing.
Byggiár: 1983.
Kostnaður: kr. 1.875.000

Áhugað kunnu ringja
**tlf. 322424 ella 254637**



## Móttøkufólk

Søkt verður eftir móttøkufólki seinnapart at byrja skjótast til ber. Arbeiðið fevnir um telefonavgreiðslu og annað fyrifallandi arbeiði.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til

**Advokatskrivstovuna**
Fr. Petersensgøtu 9 · Tórshavn
tlf. 31 11 45
og spyrja eftir Óla Jákup Kristoffersen
e-mail: ojk@advlaw
ella Elini Svínoy, e-mail: els@advlaw.fo



## Byggifrøðingur

Søkt verður eftir byggifrøðingi/-teknikkara at byrja beinanvegin, skal kunna tekna á teldu.

Áhugað kunnu venda sær til teknistovuna.

**Sp/f Teknistovan**
v/ Jens Kl. Jacobsen og Henning Olsen,
ráðg. byggifrøðingar
Tel. +298 442105 · Fax +298 442107
Far.: J. K. J. 212105 · H. O. 228752
e-mail: klement@post.olivant.fo
FO-510 Gøta



## Fólk søkist

Fólk søkist at arbeiða fulla tíð til Thomas Dam Búnýti at byrja beinanvegin.

Royndir innan handil er ein fyrimunur.

Thomas Dam búnýti
Niels Finsensgøta 18 · Box 1094 · FO-110 Tórshavn
Tlf. 314930 · Fax 314933





Sjúklingahotellið Tórshavn

Søkt verður eftir
## starvsfólki til køkin
### á Sjúklingahotellinum Tórshavn

Sjúklingahotellið søkir eftir einum kokki, økonomu ella køksassistenti 37 tímar um vikuna við vikuskiftisvakt 3. hvørja viku.

Viðkomandi má hava áhuga fyri at gera heilsugóðan mat til búgvandi á hotellinum.

Vit ynskja eisini, at viðkomandi er framsøkin og vil vera við til at menna arbeiðið í køkinum á Sjúklingahotellinum.

Arbeiðið fevnir um matgerð, innkeyp, ger av matarskrá og reingerð.

Í køkinum starvast 3 fulla tíð og ein hálva tíð.

Sjúklingahotellið Tórshavn er ein stovnur undir heilsumálaráðnum, ið hevur til uppgávu at hýsa føroyskum sjúklingum sum eru í Danmark til viðgerð, og avvarðandi teirra.

Á hotellinum er pláss fyri umleið 70 búgvandi og her starvast 18 fólk.

Um tú vilt vita meira, ert tú vælkomin til at ringja til leiðaran Inu Frisdahl á tlf. +45 77336464 ella +45 21677290.

Løn sambært sáttmála millum Økonomaforeiningina og Keypmannahavnar Kommunu.

Umsókn við avriti av prógvum, skal sendast til:

**Sjúklingahotellið Tórshavn**
Tåsingegade 29 5. sal
2100 København Ø
att. Ina Frisdahl
ella if-torshavn@get2net.dk

Umsóknarfreist: 20/1. 2003 klokkan 14.00.



## Pedagogur
### til útibarnagarðin TERNAN

Søkt verður eftir pedagogi til útibarnagarðin at arbeiða fulla tíð - 40 tíma viku at byrja 01. mars 2003.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran á tlf. 443 125 ella 215 125.

Skrivlig umsókn við avritum av møguligum prógvum skal verða kommununi í hendi í seinasta lagi **hósdagin 23. januar 2002.**

Um ongin skikkaður umsøkjari er, verður hjálparfólk sett í starv.

**Leirvíkar Kommuna**
520 Leirvík



## Mentanargrunnur Landsins
### Starvslønir til listaligt og mentanarligt arbeiði

Starvslønir verða latnar umsøkjarum við støði í listaligum og fakligum metingum av verkevni ella verkætlan.

"Endamál grunsins er at styðja starv fyri føroyskum máli, bókmentum, list, vísindum og øðrum mentanarmálum bæði hjá leikum og lærdum.
Grunnurin skal serliga stuðla tiltøkum og verkætlanum, sum kveikja og menna føroyska myndlist, tónlist, bókmentir, sjónleik og aðra list, sum kann javnmetast við hesar listagreinir."

Starvslønirnar kunnu verða latnar soleiðis:
1 starvsløn galdandi í 3 ár
og
starvslønir galdandi í 1 mánað til 12 mánaðir

Upphæddin á starvslønini svarar til læraralønina á fólkaskúlans lønarstigi 21, stigi 1, sum eftir 1. mars 2003 verður kr. 20.073,58 um mánaðin.

Umsóknir skulu vera nevndini í hendi í seinasta lagi 21. februar 2003

**Umsóknarbløð fáast frá Mentanargrunni Landsins**
Tórgarðsgøtu 42 - FO-100 Tórshavn
Tlf. 32 08 42 - fartlf. 21 80 13 - fax 31 19 98 - teldupostur: mentan@post.olivant.fo



## Sethús í Klaksvík

Hervið verða húsini við Gráastein 6, í Klaksvík, lýst til sølu. Matrikkulnummari er 1533.

Grundstykkið er 618 m².

Húsini eru 145 m², útvendigt mát, í tveimum hæddum. (Íalt 290 m²).

**Húsini eru soleiðis innrættaði:**
**Ovara hædd:**
Køkur, stova, vindfang, gangur, 3 sovirúm, hjúnarrúm, kontór, baðirúm og eitt lítið wc.

**Niðara hædd:**
Køkur, stova, hjúnarrúm, sovirúm, baðirúm, vaskirúm, fýrrúm/turkirúm, gangur, kjallari og garaga.

Ovara og niðara hæddin kunnu verða sjálvstøðugar íbúðir.

Húsini eru bygd í 1970 og eru væl hildin. Urtagarður er rundan um húsini.

Húsini verða seld um nóg høgt boð fæst.

Vinarliga ring á telefon **262389 eftir kl. 17.00** um okkurt at at spyrja um, ella tygum ynskja at síggja húsini.



Tórshavnar Ítróttar- og Samkomuhøll



## Hallarvørður

Søkt verður eftir hallarvørði til Tórshavnar Ítróttar- og Samkomuhøll.

**Arbeiðsuppgávurnar eru m.a.:**
- at røkja høllina og økið uttanum
- at gera umvælingar
- at ljós, hiti og sanitetsviðurskiftini eru í lagi
- at trygdarbúnaðurin virkar sambært ásettum krøvum
- at halda reint og ruddiligt inni og uttan um høllina
- at hava umsjón við og samskipa reingerðina í høllini
- at hava samskifti við tey, ið brúka høllina
- at umsita fíggjarviðurskiftini hjá høllini

**Førleikakrøv**
Tú skalt hava handverkaraútbúgving, duga at arbeiða sjálvstøðugt, vera røkin og hava góð samstarvsevni. Hevur tú ikki skeið í skipaðum viðlíkahaldi av bygningum, skipar høllin fyri hesum skeiði.

**Starvs- og setanarviðurskifti**
Starvið er fulltíðarstarv við skiftandi arbeiðstíðum og verður sett skjótast til ber. Møguleiki er at seta hjálparfólk. Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Meiri fæst at vita**
um starvið fáast við at venda sær til Annfinn Brekkstein, formann í starvsnevndini hjá høllini, tlf. 215800 ella heima 328058.

**Umsókn**
við upplýsingum um útbúgving, starvsroyndir og møguligum viðmælum skal vera Tórshavnar Ítróttar- og Samkomuhøll, postboks 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 13. januar 2003. Viðmerkið umsóknina: Hallarvørður.



## GreenGate Incoming Ltd.

**P/F GreenGate Incoming er ein ferðavinnufyritøka í Tórshavn, ið miðvíst arbeiðir við at skipa fyri ferðum fyri einstaklingar og bólkar til, og runt um í Føroyum. GreenGate Incoming arbeiðir eisini við samskipan av ráðstevnum.**

Fyri viðskiftafólk okkara, ið vitja í Føroyum, vilja vit hervið lýsa eftir húsum og privat gisting runt um í landinum. Vit atlitið til tíðarskeiðið 9-12/6, tá fótbóltsdysturin Føroyar-Týskland verður spældur, verður tað fyrst og fremst gistingar í miðstaðarøkinum tørvur verður á.

Vinarliga seti tykkum í samband við okkum á **tlf. 320520 ella á fartelefon 210601.**



it lyta yri irkir sto nar og pri at

FAROE TRANS
Vøruflutningur
50 69 69
e-mail: faroetrans@email.com

Ring og fá eitt gott tilboð